tjak og meiningar

Skrokkurin spøkir aftur

Formaður sambandsfloksins, Pauli Ellefsen, hevur nú tikið fyrsta stigið til rotturesið — hann smíðar og setir nú fellur út.

Í Dimmalætting tann 3. oktober 1989 — í fasta portrætteigi Paula Ellefsens — er áhugaverd samansett grein.

Ein tann absolutt hægst lønti grannskoðararáðgevin í Føroyum í dag, ein maður við húsaognum bæði her og der — nýggja villa í Spaniu, harragarði í Hoydølum — ein maður, ið ferðast í tyngst tónaðu GLE-SLE Volo-bili av nýggjasta árgangi, ið er at siggja á teimum føroysku vegunum — hesin harri við teimum positivu lygnunum og sum eisini er kendur fyri at hava komið sær fram á føroyska politiska leikpallinum við framhaldandi í fleiri ár at hava rætt um ein skrokk — hesin tiltikni jonglørurin (sum fyrr í ár »hevur svorið eið uppá at útrudda allar føroyskar javnaðarmenn, ið hann samanber við rottur) — hesin er nú við at rigga sær fellurnar til og ein tann fyrsta av hesum rottufellum er nú vorðin útsett í Dimmalætting. Áhugavert er skrivingarlagið hjá Paula Ellefsen, áhugavert er at siggja mátan, hann ger nýtslu av óhefta politiska blaðnum Dimmalætting — áhugavert lay-out, eingin hevur minsta illgruna um, at Pauli Ellefsen skrivar sjálvur um seg sjálvan, men allíkavæl fær hann ein p.n. (ivaleyst sami p.n., ið setti høviska Eilif Samuelsen í verstu klemmu í sambandi við stóru kravgonguna herfyri, har hesin sjálvrættvísis ósti p.n. »gekk av« — av ovursinni — eins og o d d a g r e i n s k r i v a r i Dimmalættingar tann 3. okt. 1989.

Og hvat er tað so, sum Pauli Ellefsen nú aftur ætlar sær at nýta til rumbuls? Og hvønn er tað, ið Pauli Ellefsen hevur ætlanir um at ávirka við sínum rumbli?

Ætlanin er politiskt málrættað og tað er Palleboð, sum nú aftur kann fróast um, at Pauli Ellefsen enn eina ferð tykist hava ætlanir um at fara at rumbla við skrokkum.

Tað er dalandi stjørna sambandsfloksins og tað er tann alt ov væl orðaða argumentatiónin frá føroyskum javnaðarmonnum í Sosialinum, ið pínur so svára.

Pauli Ellefsen ætlar sær at flyta atkvøður.

Hann sigur: Brot 1. *Vit, sum á løgtingi og varða av sitandi landsstýrissamgongu, hava rætt til nærri upplýsingar um figgjarligu gongdina hjá landskassanum.*

Eins og allir aðrir Palleboar, so hevur Pauli Ellefsen ikki bara rætt til — nei, sum fólkavalt umboð, so hevur Pauli Ellefsen skyldu til at fylgja við figgjarligu gongdini hja landskassanum — tað haldi í hvørt fall eg, sum í hesum føri at kalla meg fyri Palleba.

2. brot: *Tær illgitingar, sum Føroya Javnaðarflokkur og Sosialurin bera fram um orsøkirnar til ta trongstøðu, sum landskassin, og alt tað føroyska samfelagið, eru komin í, standa ósvaraðar.*

Í hesum broti skirir Pauli Ellefsen tær grundgevingar, ið Føroya Javnaðarflokkur og Sosialurin hava borið fram sum orsøkir til ta trongstøðu, alt tað føroyska samfelagið er komið í fyri illgitingar.

Hetta at kalla sakligar grundgevingar fyri illgitingar er so sin sak — vit kenna okkum sannførdar um, at Føroya fólk í stóran mun man hava eitt annað heiti fyri hesum . Tað, sum Pauli Ellefsen endar við at siga í hesum sínum broti, er einki minni enn ein sensatión! Hann sigur bart út, at grundgevingar Javnaðarflokksins og Sosialsins standa ósvaraðar.

Hesum orðum rakar Pauli Ellefsen óviljandi seymin á høvdið. Í útvið eitt ár hevur nationalkapitalistiska høgrasamgongan ikki við einum stavi so mikið sum roynt at afturvist teim grundgevingum, ið hava verið frambornar av Føroya Javnaðarflokki og Sosialinum um orsøkirnar til hættisligu støðuna í okkara landi. Tað hevur valdað ein latent og kviðin tøgn.

Áhaldandi hevur tað verið vist á orsøkir og avleiðingar.

Uttan slit, uttan íhald hava tað verið framfordar avdúkandi lýsingar av orsøkunum til henda privatpolitiska óðamannaleik høgrasamgongunnar.

Í fleiri førum eru beinleiðis spurningar settir, m.a. eisini formanni Sambandsfloksins uttan at hesin enn hevur dittað sær at svara.

Stigvist hevur tað verið neyðugt at herða hesa skriving í ti vón, at um ikki annað, so at beinleiðis provokatiónir møguliga kundu fara føra til at hesir menn komu til sans og samling — men so eiðasort — og øll skilja ti, at tað er onki minni enn sensatión, at formaður Sambandsfloksins nú alment konstaterar orsøkir, prógvførsla og avdúkingar Javnaðarfloksins og Sosialsins standa ósvaraðar!

Hetta er sensationelt, ti hetta er fyrsta ítøkiliga erkennilsi frá sjálvum ti manni, ið má haldast at sita á mesta politiska valdi í Føroyum í dag og so kann hesin maður spæla so óengageraður sum honum lystir, øll vita jú betur.

Ósketni, harra formaður — ella ert tú bara blá-oygdur?

3. brot: *Gera tær tað, so kann tað ikki undra, at mótmæli koma frá okkara borgarum.*

Í triðja broti fáa vit konstatering nr. 2 í hesi grein Paula Ellefsens. Hann sigur, at so leingi grundgevingar Javnaðarfloksins og Sosialsins standa ósvaraðar, so er tað ikki at undrast á, at mótmæli koma frá landsins borgarum. Eftir hetta brotið átti hann at dugt sær at tagt, men so er kortini ikki.

Hesi fyrstu brotini eru bert ein sjálvsøgd innleiðing til tað mál, Pauli Ellefsen í hesum umfari hevur sett sær fyri. Málið er roykslóring, villleiðing, avleiðing.

»Ein vandi við bandupptakarum er hesin, at tú ikki sært tað, tú hevur »skrivað«. Skjótur og litið nærlagdur sannlíkiligt ti at politikkur í Paula Ellefsensa útvendu verð skal tykjast at vera nakað sekundert — eitt greb í lumman — so er hann neyvan klárur yvir hvat tað veruliga er, hann longu hevur sagt. Tað má haldast vera ein avgjørd fadesa, hetta at spæla sær so lættsindugt við sínum annars flossuta trúvirði, hetta at billa sær inn, at nakar skuldi farið at verið so naivur, at tað, sum Pauli Ellefsen viðari roynir at fáa til at ljóða á prenti, at hetta av nøkrum hugsandi føroyingi verður skilt sum nakað svar uppá »illgitingar« Føroya Javnaðarfloks og Sosialsins um orsøkirnar til at høgrasamgongan er í ferð við at átaka sær ta heilu og fullu ábyrgd fyri at kovra samfelagið á húsagang. Ella skuldi ein heldur havt sagt sum rættari er: »Hesar innleiðandi fyrireikingar Paula Ellefsens til eitt rumbulsmál átøkt skrokkamálinum á sinni«.

Ti ikki ein heilsiðulýsing í forhond í politiskt óhefta politiska málgagni Sambandsfloksins hevði meira týðuliga kunnað avdúkað hvat ið tað heilt nágreiniligt er fyri nakað, ið Pauli Ellefsen er úti eftir at røkka við síni skriving. Eins og tað í oddagrein í Oyggjatíðindum fyrradagin longu varð vist á, so er tað ikki tann hvíti flotin, ikki heldur tann svarti, nei tað er tann reyði flotin, ið verður tikin í nýtslu »sum amboð«. Tað verða kravdar upplýsingar so sum nøvn á eigarum, samlað skuld v.m. Serliga ódámligur er spurningur 3 hjá hesum grannskoðara, »Hvussu stór var samlaða skuldin hjá ti av hesum skipum, sum skyldaðu mest«.

Tað hevur verið argument, tølandi tøl og »sakliga« dokumentatión« Paula Ellefsens, ið vóru avgerandi, ja, tey vóru tungan á vágskálini, tá støða varð tikin til at gera sáttmála um nógvu skipaprojektini. Sum við globala tangaskipaflotanum og øðrum burtur úr vón og viti projektum.

Eins og í global-gøluni, har hundraðtals borgarar settu navnið á »grannskoðað« skjøl og soleiðis lendu í ringasta óføri, eins og við flestu av tapgevandi skipunum í ti føroyska flotanum, so hevur tað verið Pauli Ellefsen, ið hevur ráðgivið í teim størstu málum.

Tað, sum Pauli Ellefsen síðan heldur fram við, man helst fara at koma undir heitið ábøtur til argumentatións-katalogið hjá sambandsveljarum, sum í hesum døgum standa so spillnaknir roynandi at fjala seg í sand og ósku.

Brot 4: *Vit vita so mikið, at undanfarna javnaðarlandsstýri stilaði fyri, at okkara figgjarløgtingslóg bleiv meira enn dupladað eftir einum valskeiði, og er komin uppá heilar 3,2 milliardir kr. Tað er sólarklárt, at hesar útreiðslur uppá 3,2 milliardir, harav meginparturin skal gjaldast av Palleba, seta størri krav enn galdandi inntøkulógir kundu klára.*

Her letur Pauli Ellefsen sum um Palleba ikki er greiður yvir, at figgjarlógin undir seinasta valskeiði m.a. eisini vaks við samlaða blokkinum frá ti danska ríkinum.

Brot 5: *Vit vita eisini, at Føroya Javnaðarflokkur gongur inn fyri at loysa henda spurning við at áseta hægri skatt, ein loysn, sum Sambandsflokkurin higarti hevur forðað fyri.*

Her er talan um lodrætta positiva lygn bæði so og so. Føroya Javnaðarflokkur hevur m.a. í hyggju at stórur partur av figgjarløgtingslógini skal

Framhald á síðu 21



Dimmalætting

Vit hava rætt til nærri upplýsingar

Upphøggingarstuðulin skal leggjast undir lupp

Landsstýrið 1985-88 jattaði 80% av skuld, lanum, kreditorum v. m.

Páll Ellefsen